# PE opnar handil í Sørvági

**Flytingar – er rætta orðið, tá tú skalt lýsa handilslívið í Vágum beint nú.**

**PE tekur yvir handilin hjá Valdemar í Sørvági og førir hetta nógvar broytingar við sær**

HANDIL
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Í nógv ár hava sørvingar havt tveir matvøruhandlar – hjá Valdemar og Løðuhandilin. Hesir liggja síðu um síðu, og kappingin hevur mangan verið hørð.

Nú gevst Valdemar Simonsen og hansara familja við handlinum, og ístaðin tekur PE yvir teirra handil.

Í hesum høpi gevst Sólva Thomassen eisini við sínum handli – Løðuhandilinum – og fer ístaðin inn til Valdemar at arbeiða.

– Tá eg fekk hetta tilboðið segði eg fyrst nei. Men tá eg hugsaði eitt sindur víðari helt eg tað verða eitt gott hugskot at sleppa av við alt og fáa minni ábyrgd, sigur Sólva Thomassen.

Orsøkin til at Petur Eirik Djurhuus, sum eigur PE, vildi hava Sólvu við, var at hon hevði Samkeyp, og teir vildu hava Samkeyp inn til handilin hjá Valdemar.



*Sólva Thomassen fer inn til kappingarneytan Valdemar at arbeiða.*




*Handlarnir Hjá Valdemar og Løðuhandilin liggja síðu um síðu í bygdini í Sørvági.*

### Broyta navn

– Vit hava yvirtikið báðar handlarnir og leigað hølini, sigur Petur Eirik Djurhuus.

Starvsfólkini í Løðuhandlinum hava øll fingið tilboð at koma við inn til handilin hjá Valdemar, og starvsfólkið har verða øll verðandi í handlinum, sum nú fer at broyta navn til PE.

Stjóri í nýggja handlinum verður Ingi Ørvarodd, sum nú er stjóri í PE á Argjum.

– Vit fara at byggja handilin um í mai. Tá verður hann stongdur í tríggjar vikur, men tá fer Løðuhandilin at verða opin, sigur Petur Eirik Djurhuus. Nýtt ljós skal leggjast inn, veggirnir málast, og kassaskipanin skal skiftast út.

– Hesin handlin skal líkjast PE á Hálsi. Tað verður meira ein matvøruhandil nú, og tógvið skal millum annað takast burtur, sigur Petur Eirik.

Apoteksvørurnar, sum eru nú, verða tó verðandi.

### Ein triði handil

Á loftinum hjá Valdemar eru nú tveir handlar - Kurvin og Sorella - sum selja ávíkavíst innbúgv og klæðir. Har skal eisini byggjast um, og væntandi skal ein triði handil opnast.

Hvat ið ferð at henda við Løðuhandlinum veit ongin í dag. Hølini verða nokk lýst tøk til handilsvirksemi. Men bæði Sólva Thomassen og Petur Eirik Djurhuus eru á einum máli um, at tað nokk ikki verður matvøruhandil har.

– Hølini eru ov lítil og ótíðarhóskandi til matvøruhandil, sigur Sólva Thomassen.

### Sandavágsbakarin

Bakaríið hjá Valdemar, sum hevur latið breyð runt allar Føroyar, er nú eisini yvirtikið av bakaranum úr Sandavági, Jóhannes Guðjónsson. Hann ætlar sær ikki at broyta nakað størvegis, men heldur fram í fótasporinum hjá Valdemar Simonsen.

Einasta sjónliga broytingin er, at á breyðpakkunum stendur ikki frá Valdemar longur, men frá heimabakaríinum úr Sandavági.



*Breyði sum nú verður keypt hjá Valdemar er baka av bakaranum úr Sandavági.*

Útbjóðing

## Mykinesleiðin

SL fara við hesum alment at bjóða út rutusiglingina á Mykinesarleiðini.

Útbjóðingartilfar fæst
við at venda sær til:

Strandfaraskip Landsins
Att. Henny Højgaard
Yviri við Strond 4
FO–100 Tórshavn

Tilboð skulu sendast í seinasta lagi
fríggjadagin 17. mars 2005, kl. 12:00 til:

Strandfaraskip Landsins
Att. Rakstrardeildin
Yviri við Strond 4
FO–100 Tórshavn

Siglingin byrjar 1. mai. Nærri upplýsingar um útbjóðingina kunnu fáast við at venda sær til Regin Vágadal, rakstrarleiðara á tel. 343000 ella t-post rev@ssl.fo

REPROZ

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo

LEIÐARI TIL NONE-FOOD DEILDINA
Í NÝGGJA MIKLAGARÐI SØKIST

TÍNAR ARBEIÐSUPPGÁVUR ERU:
At keypa inn, prísáseta, seta vørur upp, gera og halda fíggjarætlan, og hava starvsfólkaábyrgd.

Best er, um tú hevur kunnleika til hetta starvsøkið, tú mást vera røkin, opin, og sera ágrýtin. Tú mást vera til reiðar at leggja eina rúgvu av orku og ómak í starvið.

Løn sambært avtalu.

SEND SKRIVLIGA UMSÓKN TIL:
Miklagarður Att: Johnny Priess, Postboks 1059, 110 Tórshavn

Eru spurningar, kanst tú ringja til Jonny tel. 28 30 11

MIKLAGARÐUR